# Yrkisskeið innan landbúnað í Kollafirði



*Festarar kunnu nú fáa kravda yrkisskeiðið í landbúnaði í Føroyum. Fyrsta skeiðið byrjar mánadagin í Búnaðardeplinum í Kollafirði*

**Tað er lógarkravt, at allir bøndur skulu hava eina útbúgving fyri at kunna sita í festi ella at festa. Hendan útbúgvingin kann millum annað fáast í Noregi, men nú ber eisini til at nema sær hesa útbúgvingina í Føroyum**

LANDBÚNAÐUR
*Solby A. Eliasen*

Til ber nú hjá teimum, sum ynskja at festa ein garð ella at verða sitandi í festi at nema sær kravda útbúgvingarskeiðið í Føroyum. Mánadagin byrjar eitt skeið á búnaðardeplinum í Kollafirði.

Sosialurin fættir, at 21 hava teknað seg til tað fyrsta skeiðið. Og tey byrja sum sagt mánadagin.

Napoleon Nólsoy, stjóri á Tórshavnar kvøld og ungdómsskúla, sigur, at tey fingu eina áheitan frá Mentamálaráðnum um at taka útbúgvingina upp her í Føroyum, so at áhugaði kundu tekna seg her.

- Og tað er so gjørt nú, og áhugin hevur víst seg at vera sera stórur, sigur hann.

Hann greiðir frá, at tað kann fara at verða torført at leggja tímatalvuna tilrættis, tí tað verða bæði yngri og eldri næmingar líka úr Sumba til Norðoyggjar, sum koma at ganga á skeiðinum.

- Vit fara at hava ein fund um, hvussu vit tilrættisleggja tímatalvuna í morgin, so enn ber ikki til at siga nakað um, hvussu tað fer at síggja út.

Tað er ymiskt sum skeiðsluttakararnir ynskja, at skeiðið verður tilrættislagt. Summi ynskja vikuskiftini, onnur kvøldini og upp aftur onnur halda tað er í lagi, at tað verður um dagarnar. Men tað verður so fingið greiða sum skjótast.

### Próvtøka og verkætlan

Útbúgvingin er eitt skeið upp á tilsamans 200 tímar, har næmingarnir ganga til ávísar lærugreinar innan landbúnað. Næmingarnir skulu síðani upp til próvtøku og gera eina verkætlan, sum eisini skal leggjast fram.

Lærugreinarnar, sum verða á skeiðinum eru lívfrøði og náttúra, húsdjór, plantur, tøkni, búskapur og so verkætlanin. Teir 200 tímarnir eru so býttir yvir tær ymisku lærugreinarnar alt eftir, hvat verður mett, at tær koma at krevja.

Henda útbúgvingin er sum sagt eitt krav fyri allar festarar, og tey sum ætla at festa í Føroyum. Tað er Føroya Jarðarráð, sum ásetur hetta krav.

Sambært lógini fyri yrkisskeiðið skal tað nøkta tørvin hjá føroyska landbúnaðinum, tá tað snýr seg um yrkisligan førleika og almennan kunnleika.

Endamálið við skeiðinum er, at tað skal geva fólki við drúgvum vinnuroyndum neyðugt ástøðiligt og verkligt grundarlag at reka eitt festi á einum burðardyggum grundarlagi.

Umsøkjararnir skulu vera minst 25 ára gomul og hava arbeitt á einum garði í minst trý ár.

## Geisandi og geislandi ljós

Á ferð
gangandi í meldrinum
steðgi
fari inn um grindina
her er friðsælt

livandi menniskju
bjarvað í spjørrum
liggja her skitin og tvitin
rivin og skrødd
skelvandi hendur
deyðmerktir kroppar
eygu, ið onki skoða
dølsk, reyð og blóðsprongd
hárið í andarisi

døkku og tómu eyguni
full av sorg, angist, ótta
longsli eftir tryggleika,
gleði og kærleika

eitrandi løgur við hondina
onki medvit - sjálvseitran -

tó eitt vakið eyga
ansar eftir
at eingin tekur
tann síðsta dropan
annars
stendur neyðin í durunum
tostin
ið aldri slóknar

vónloysi, ráðaloysi

gangi framvið
hugmóðin, sjálvgóðskan
reinleikans glæma randar ennið

men vendi aftur
ynski at koma á tal við tey
onki lívstekin
onki svar

Vit knógva okkum
innar í
tað lekjandi, bleiktrandi dagsljósið

hesi mongu
liggjandi við ríkmansins borð
ei í hondunum á
krígsgreðingunum
og teirra líkum
eirindaleysu spekulantunum
ið standa saman
samantvinnaðir
í øllum liðum

hesi mongu
liggjandi á berajóli
skjóttan tóm
taka ei lut í
vápnaframleiðsluni
heimseitranini
eitrandi spekulantunum

stinkandi ríkmannakøstarnir
fløða um allan heimin
eitrandi mátturin
eitrar og oyðir bæði sál og likam

hugsjónarleysu
nikkudukkurnar
verða dølskar

eru spekulantunum lýðin
í øllum lutum

glantrileikurin
fær ongan enda
tey hugsunnarleysu
og fínarimpurnar
fylla køstarnar
aftur og aftur

vit báðir
knógvandi
innar í kirkjuna

gáttin var heldur høg
men tað gekk

festi í kertu
ið har stóð
bíðaði eftir
at branda
geislandi ljós
bjartar ljósrípur
tekin um takksemi
gleðin
breiðir seg eins og
ringar í vatni

login ber
uppeftir
tráðanin eftir góðsku, rættvísi
javnrætti, brøðralag

spreiðir seg í allar ættir
brennandi ljós
í sorgarstund
allar óndar maktir
dvína, hvørva
sálin verður borin
til eitt land
har ongin sorg, pína, angist
valdar

brennandi ljós
djúpi longsul og saknur í
barmi

longsulin innar í frælsisheimin
er máttmikil
brennandi, logandi
ein sannur geisari
heitur og lívgandi

brennandi longsul eftir
sonnum vinum
samstøða valdar
í ljósi
miklu samanrenning
og sameining

allar óndar kreftir flýggja

her er alt so ófullkomið
eingir gyltir veingir

letur spakuliga í honum

meðan handan
við ljósins keldur
tá vit verða fullkomin
fáa vit veingir !

brennandi ljós
kyndlar á ferð
ein óteljandi gonga
mótmælir
móti heimsins órættvísi

Stríðsmerkini sýna leið
stríðshópurin á ferð
við brennandi hjarta
sál og sinni
ein heilhjartaður hópur

ríkmenni- kapitalistarnir-
marglætisgreðingarnir
flýggja
undan
hesum brennandi, bleiktrandi
ljósum, kyndlum
ið spreiða
mátttmikið
geislandi
dagsljós kring seg
í allar ættir
skera djúpt
- reinsa ríkmansins
óhumsku -
krevja sín rætt

ljósins kelda
aldri tagnar og doyr

floymir inn yvir tey mongu
ið á leiðini fylgjast
gevur styrki og áræði
ljóskeldan
aldri tornar
vellur fram
og víða geislar

kenni meg styrktan
ein rík løta

kemur við mær
til eitt eydnuríkt stað

Vit eru á ferð

Ljósini skyggja og spreia
gleði, frælsi, frið, kærleika
og rættvísi
í allar ættir

koma til ein blómandi aldingarð

har tey brennandi ljósini
sterk, máttmikil og brimandi
login ongantíð slóknar
halda marglætisgreðingunum burtur

hesin stríðsfúsi hópurin
steðgar ei á
vil framá
kveistrar alla óhumsku
burtur á sínum veg

fagnaðarljómur

Ljósini brenna, strála
slókna ei
stríðsfýsni kyndilin
brimandi á síni ferð.

spjaðingarandin er sterkur
tó
sterkari og máttmiklari er
samstøðuandin

komi aftur á gøtuna
ár seinni
støðugt brenna ljós
í hópatali

sanniliga tey
samhaldsføstu
og stríðsfúsu ljósini
á ongum sinni slókna.

eitrandi, køvandi
høgrarákið
niður í dýpið søkkur.

máttmikli og mergjaði
stríðsroðin
ber okkum fagnaðarboð!

rættvísisfylkingin
er á ferð!

**26. sept. 2002**
**Sólmundur Joensen**

# ítróttur

Nr. 205 • fríggjadagur • 25. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Kyndil-Tjaldur 26-27 (14-14):

## Tjaldur tók Kyndil á bóli



*Tað merkit avrikið hjá Kyndli, at Lotte Sørensen varð mansvard allan dystin á tamb, men yvirhøvur var tað Tjaldur, sum vildi meira, og tað fingu tær eisini løn fyri*

**Tjaldur vildi snøgt sagt meira enn Kyndil, tá liðini dystaðust, og so endaði alt við einum sera óvæntaðum sigri til gestirnar, sum soleiðis fingu fyrstu stigini á árinum**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var nokk einki at ivast í, hvør var favorittur undan dystinum á Hálsi mikukvøldið. Kvinnurnar hjá Kyndli hava kanska í eini tvey ár havt eina lítið hugaliga tilveru í botninum av stigatalvuni. Men nú tykist skútan vera vend, og avrikini í fyrstu dystunum bendu í øllum førum tann vegin, at liðið skuldi hava ein leiklut í oddinum í ár.

Hjá Tjaldri hava vónirnar undan árinum helst ikki verið heilt so bjartar. Her er tað meira sjálv tilveran í bestu kvinnudeildini, sum stóð upp á spæl, men við fýra ósigrum á rað fyrstu dystirnar, sá kanska nakað svart út hesum viðvíkjandi. Og tað mundi so neyvan vara nakran, at fyrstu stigini skuldu koma í hesum – á pappírinum – torføra útidystinum.

### Umberingar

Í Kyndli eru helst fleiri frágreiðingar um, hvussu tað bar til, at tær soleiðis vóru fyri einum óvæntaðum – fyri ikki at siga sensationellum – tapi mikukvøldið.

Umberingarnar eru helst fleiri, og í onkrum føri er kanska nakað um tað. Eitt nú var tað uttan iva ein stórur smeitur, at Kyndil til dystin mátti vera tær báðar Annikurnar fyriuttan. Annika Ljósstein fekk skaða, tá Kyndil spældi móti StÍF, og enn ganga helst einar fýra vikur, áðrenn hon er tøk aftur, og Annika Thomsen er í løtuni burturstødd. Helst eisini í einar fýra vikur.

Hinvegin hoyrir tað eisini við til søguna, at Tjaldur heldur ikki hevði fulla manning til dystin. Beinta Joensen, sum uttan iva er ein av mest týðandi leikarunum hjá felagnum, hevur í løtuni ikki umstøður at vera við hvørja ferð, og hesa ferð hevði hon so valt at geva avboð til dystin.

### Vilijn

Umberingar ella ikki, so var tað í botn og grund bert ein veruligur munur á liðunum mikukvøldið. Tjaldurskvinnurnar sýndu allan dystin, at tær vildu gera sítt ítarsta, til tess at tryggja sær eitt gott úrslit. Eisini hóst tað í løtum sá heldur svart út.

Kyndil hinvegin vísti bara í løtum, at tær vildu vinna. Tað hoyrir við til søguna, at tá tær gjørdu tað, sýndu tær veruliga, at tær undir vanligum umstøðum eiga at vinna á Tjaldri. Men tað er aloftast so, at til at vinna ein dyst, so krevst, at hugburðurin er hin rætti alla tíðina og ikki bara í løtum.

### Mansverjan merktist

Um sjálvan dystin er annars at siga, at hann í ógvuliga stóran mun var merktur av, at báðir partar alla tíðina settu sær fyri at órógva spælið hjá mótstøðuliðnum mest møguligt. Frá fyrsta bríksli vórðu ávíkavist Lotte Sørensen og Milica Ergic mansvardar, so tær ikki skuldu seta sín dám á dystin, og hetta gjørdi sjálvsagt, at spælið mátti koyrast heldur øðrvísi, enn tað vanliga verður gjørt.

At plássið inni móti málteiginum gerst betri, tá mansverja verður nýtt, er ein sjálvfylgja, og hvør í sínum lagi royndu liðini eisini at gera sær dælt av hesum. Ikki minst tí verjurnar báðar tóktust hava ilt við at verja víðkaða økið, og tá so bæði Christine Ellingsgaard og Marjun Tróndarson høvdu ein góðan dag á strikuni – í øllum førum í álopspartinum – so vóru sjáldan deyðar løtur í dystinum, har millum lítið og einki hendi.

Í fyrra hálvleiki tóktist tað alla tíðina soleiðis, at Kyndil hevði tamarhald á tí mesta. Hóast munurin ongan tíð gjørdist hin stóri, so glógvaði í løtum somikið væl í grøna liðnum, at tú hevði varhugan av, at tað bara var ein spurningur um tíð, áðrenn munurin av álvara fór at økjast. Ikki minst eftir at tær miðskeiðis í hálvleiki togaðu seg frá 5-7 upp á 10-7. Eftir hetta dovnaði liðið tó aftur, og ístaðin gjørdist tað Tjaldur, sum við einum longum togi stríddi seg upp á javnt beint fyri hálvleik.

### Passivitetur

Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki svaraði Kyndil tó aftur á sama sannførandi hátt, sum tær høvdu gjørt í fyrra, men so steðgaði aftur upp. Úr 19-16 broyttist støðan til 19-22, og yvir høvur tóktist Kyndil hava merkiliga lítið at bjóða upp á hesa løtuna. Ikki minst var tað merkisvert, at kvika og gjøgnumbrotssterka Ileana Manolescu varð hildin á beinkinum alla hesa løtuna, tí við fimm ímóti fimm er tað júst slíkur leikari sum tørvur er á. Og kanska var venjarabonkurin hjá Kyndli eitt sindur ørkymlaður av støðuni, tí tað gekk í øllum førum óvanliga long tíð, áðrenn grøna kortið varð lagt á dómaraborðið, so venjarin kundi fáa nøkur orð við leikararnar.

Tá hetta loksins varð gjørt, fingu áskoðararnir ein sera spennandi endaspurt at síggja. Kyndil roynidi at seta ferð á, og partvíst eydnaðist hetta, men Tjaldur helt seg tó alla tíðina nevið frammanfyri. Kanska eisini tí Lotte Sørensen fekk eina heldur óneyðuga útvísing bert tríggjar minuttir fyri leiklok, tá munurin annars var komin niður í eitt mál Kyndil fekk strítt seg upp á javnt eftir hetta, men við tveimum málum á rað sløkti Tjaldur tó seinastu grønu vónina, og so var liðugt.

Við sigrinum tryggjaði Tjaldur sær fyrstu stigini á árinum, og fyri teirra viðkomandi man tað koma illa við, at tær nú mugu bíða heilar tríggjar vikur, áðrenn tær aftur sleppa á vøllin.

Kyndil misti hinvegin takið í oddinum, har tær annars høvdu verið væl við, um talan gjørdist um ein sigur. Enn er kanska ov tíðliga at staðfesta, at talan var um eitt dýrt tap, men ráð eru í øllum førum ikki nógvar kiksarar afturat, um vónin um ein sess í oddinum skal gerast til veruleiki.

Dysturin í tølum:
Kyndil-Tjaldur 26-27 (14-14)
Málskjúttar:
Kyndil: Marjun Tróndarson 8, Lotte Sørensen 6(4), Ann Mari Wang 4, Ileana Manolescu 4, Heidi Maria Akselsen 4
Tjaldur: Lenka Ribaric 8(2), Christina Ellingsgaard 7, Milica Ergic 6, Mona Langgaard 4, Hansa Mikkelsen 1, Heidi Heinesen 1
Brotskøst: Kyndil 5, Tjaldur 4
Útvísingar: Kyndil 1, Tjaldur 2
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sámal Hansen